


UMTÓKTAR

*Fólk eru longu flutt inn í tær fyrstu 24 íbúðirnar. Nú verður arbeitt við næsta byggistigi, har fleiri teirra eru seldar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# – Eg svav ikki ta náttina

Eftir at hava búð í Rituvík í mong ár, tóku hjúnini Rannvá og Eyðálvur Nielsen avgerð um at keypa eina munandi minni íbúð í Runavík.

Hetta var ein verkætlan sum sp/f VIST09 stóð fyri, og fevndi hon um 24 íbúðir í fyrsta umfari.

Tey vóru sera spent eftir hesum, og fylgdu við, hvussu gekk við bygginini. Tey vitjaðu við millumbilum í økinum, og ta einu ferðina var arbeiðið komið so langt, at íbúðarblokkurin byrjaði at taka skap.

Um hetta mundið vóru báðir endarnir reistir, men annars einki. Tey bæði gingu tá inn í bygningin, fyri líkasum at fáa eitt »fornemmilsi« av nýggja heimi teirra.

– Tá eg stóð har á gólvinum í tí, sum einaferð skuldi gerast okkara íbúð, tonkti eg við mær sjálvari: – Harragud, Rannvá. Hvat hava vit gjørt? Hvussu í víðu verð skulu vit kunnu liva og búgva í hesi lítlu kroysini? Ja, tá ivaðist eg eina lítla løtu.

– Og veitst tú hvat, - eg svav ikki ta náttina, tí eg lá bara og hugsaði um vit nú høvdu tikið røttu avgerðina ella ikki, greiðir Rannvá brosandi frá.

Men eftir at hava búð her síðani í mars mánaði í fjør, eru bæði hon og maðurin sera væl nøgd við alt í íbúðini.

– Hetta er besta avgerðina sum vit hava tikið, siga Rannvá og Eyðálvur við ein munn.

*Framhald á næstu síðu*